

Sonhard Johannesen spælir trummur, og Rudolf Joensen er maðurin, sum leggur botn í við bassi



Eliesar í Pálsstovu spælir gittar, meðan Ólavur Klakk syngur, skríggjar og skrálar

# Teir orginalu orginalarnir

**Ólavur Presley og hansara menn eru teir orginalu orginalarnir í føroyskum tónleikalívi. Teir spæla lívligan rocktónleik, og teir hava gjørt sínar egnu sangir, sum teir framføra við lív og sál**

– Eitt, tvey, trý, bakarí. Fýra, fimm, kom inn...

Soleiðis ljóðar tað, tá ið Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags venja á Biskupstøð í Klaksvík undan Summar Festivalinum.

Bólkurin, sum kom undan kavi fyri meira enn 30 árum síðani á Klaksvíkar Beat Festivali, tekur uppgávuna á fyrsta festivalinum í Klaksvík størsta álvara.

Bólkurin hevur dúgliga, og teir ætla sær at vera væl fyri, tá teir fara á pallin í Klaksvík.

– Eg haldi, at vit eru við at blíva gamlir, tí nú venja vit langt áðrenn, vit skulu spæla, vit stemma ljóðførini, og vit spæla í sama duri, sigur Rudolf Joensen, sum spælari bass í bólkinum.

Ja, teir ivast kanska í, um teir hava gloymt, hvussu tá átti og skuldi verða fyrr í tíðini.

– Eg haldi, at vit hava fingið Alzheimers, heldur Sonhard Johannesen, trummuspælari í bólkinum.

## FIMM ÁR SÍÐANI SEINAST

Gloym alt um nútíðar rock, rapprock, grunge, punk og hiphop. Einki kann mátast við Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags – Føroya svakasta orkestur, sum onkur kallaði teir.

Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags hava síðani 1972 staðið fyri nøkrum at teimum mest minnuligu framførslunum á føroyskum tónleikapalli. Tað er tiltikið, tá ið Ólavur Presley í rætta lagnum sang, skríggjaði og skrálaði, og onkuntíð læt seg úr klæðum á pallinum. Teir reypa ikki av at vera stórir tónleikarar, men eitt duga teir, og tað er at undirhalda. Tað er lív í, tá ið bólkurin spælir, og teir spara seg ikki.

Tað eru liðin fimm ár, síðani teir seinast spældu. Tað var til ólavsøkukonsertina, tá ið teir fingu alt at kóka í Kommunuskúlagarðinum. Tey mongu fólkini stóðu púra býtt og gløddu, tá ið bólkurin kom á pallin, tí eingin visti rættiliga, hvat tey skulu vænta, men tá ið Ólavur Presley og hansara menn fyrstu høvdu sett gongd í, vóru hvørki teir ella áhoyrararnir til at steðga aftur.

## EITT ORDANS SHOW

Bólkurin hevur sín uppruna á tí, sum varð kallað Klaksvíkar Beat Festivali í 1972. Tá spældu teir í Atlantis Bio, og seinni spældu teir eisini til aðrar konsertir.

Men hvat skulu fólk so vænta frá bólkinum anno 2004.

– Vit eru kendir fyri at hava eitt gott show, og tað ætla vit okkum at liva upp til, sigur Ólavur Klakk, sum í hesum samanhangi gongur undir navninum Ólavur Presley.

Bólkurin hevur nógvar stuttligar sangir at taka – t.d. Mín Dingeling, Lambið sigur mæ, Ein nátt við tær og Fepur.

Alt hetta og annað gott verður at hoyra, tá bólkurin fer at spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík.



Ólavur Presley og hansara menn til eina av sínum sermerktu framførslum

## GEKKUR SPÆLIR BASS

Menninir, sum manna Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags, eru kendir og royndir tónleikarar.

Ólavur Klakk er tann lívligi oddamaður, sum við sínum sangi og skráli hevur sett nýggjar normar fyri framførslu á føroyskum palli.

Afturat sær hevur hann Rudolf Joensen, sum tey flestu munnu kenna sum vertin í Gekkinum, Sonhard Johannesen, sum er royndur trummuspælari, Eliesar í Pálsstovu, sum er gittarspælari, Hanus G. Johansen, sum fólk helst kenna sum framúr vísusangara, og so yngsta mann í bólkinum, Johannes Poulsen, sum spælir klaver.

Og so er at vóna, at fólk verða heit – um ikki fáa fepur – tá Ólavur Presley og hansara menn fara at spæla lívligan rock ´n roll á Summar Festivalinum.







